# VÁGS KOMMUNA



# BÝARSKIPAN
# OG
# BYGGISAMTYKT

ENDURSKOÐAÐ
Dagft. 25.01.2016

Ískoytið dagft.  12.02.2019
5.4 Byggisamtykt fyri økið D4 inni í Ónavík

# Innihaldsyvirlit

1. INNGANGUR ..... 3
1.0. Journal nr. ..... 3
1.1. Endamálið við býarskipanini: ..... 3
1.2. Endamálið við byggisamtyktini: ..... 3
1.3. Býarskipanarøkið: ..... 3
1.4. Høvuðstættirnir í skipanini: ..... 5
2. FYRITREYTIR ..... 7
2.1. Lóggáva: ..... 7
2.2. Náttúruviðurskifti ..... 7
2.3. Fólkatal og fólkavøkstur ..... 8
2.4. Friðingarviðurskifti ..... 8
3. BÝARSKIPAN ..... 9
3.1. Býarskipanartíðarskeið og stigbýti: ..... 9
3.2. Bústaðartørvur: ..... 9
3.3. Bústaðarøki A og B: ..... 10
3.4. Øki til almenn endamál C ..... 10
3.5. Havna- og vinnuøki D ..... 11
3.6. Neystaøki E ..... 12
3.7. Frílendi F ..... 12
3.8. Ítróttar og frítíðarøki G ..... 12
3.9. Landbúnaðarøki ..... 12
3.10. Friðað økið H ..... 12
3.11. Økið til frítíðarhús I ..... 13
3.12. Veitingar: ..... 13
4. BYGGISAMTYKT ..... 14
4.1. Byggivaldið: ..... 14
4.2. Øki, sum byggisamtyktin hevur gildi fyri ..... 14
4.3. Byggiumsóknir ..... 15
4.4. Byggiloyvi og byggiváttan: ..... 16
4.5. Umsiting og niðurtøka av bygging ..... 17
4.6. Trygdartiltøk, meðan bygt verður: ..... 17
4.7. Revsing fyri at bróta fyriskipanirnar í byggisamtyktini, atgonguheimild og ..... 18
trygging av ásetingunum ..... 18

4.8. Undantaksloyvi ... 19
4.9. Kæra ... 19
4.10. Frárenning og vatnveiting ... 19
4.11. Ásetingar fyri økispartarnar, byggistig og nettonýtslustigi ... 20
4.12. Broytingar ... 30
4.13. Serstakar byggisamtyktir ... 30
5. SERSTAKAR BYGGISAMTYKTIR ... 31
5.1 Serstøk byggisamtykt fyri Løðhamar C2 ... 31
5.2 Serstøk byggisamtykt fyri á Gørðunum ... 31
5.3 Serstøk byggisamtykt fyri smáttur við Laksá B12 ... 34
6. TRYGGING OG ÚTINNING ... 36
6.1. Samtykt: ... 36
6.2. Avleiðingar fyri býráð og ognarmenn: ... 36
6.3. Kunngerð: ... 36
6.4. Endurskoðan: ... 36
6.5. Góðkenning: ... 37
7 FYLGISKJØL ... 37
8 Kortskjal ... 38

# 1. INNGANGUR

## 1.0. Journal nr.

Býarskipan og byggismatykir fyri Vágs Kommunu eru at finna í journal nr.

- 13/00188
- 14/00078 Smátturnar við Laksá

## 1.1. Endamálið við býarskipanini:

Er at áseta høvuðsreglur fyri útbygging av kommununi.

Býarskipanin samskipar tey ymisku áhugamálini, soleiðis at framtíðar broytingar kunnu fremjast á tekniskum og fíggjarligum skilagóðum grundarlagið, samstundis sum umhvørvið verður virt.

## 1.2. Endamálið við byggisamtyktini:

Er at áseta gjøllari reglur fyri framtíðar bygging á teimum ymisku nýtslu økjunum, sum tilskilað í býarskipanini.

## 1.3. Býarskipanarøkið:

### Bygdin Vágur

Bygdin suðuri í Vági er fyrstu ferð nevnd í Hundabrævinum 1350 – 1400 (*uj Vagi*) , og tað skilst at tá eru fleiri bústaðir í bygdini. Skjal frá 1447 nevnir aftur bygdina (*Suddre Wagh*), men rættiligar upplýsingar um búsetingina fáa vit ikki fyrr enn í jarðarbókini frá 1584, har 7 býlingar eru nevndir.

> Í 1737 vóru 20 hús í Vági (*Vaij*): "*16 børn, 3 lejlendinger, og 17 husmænd af hvilke de fleste ere fattige*".
>
> Bygdin verður nevnd hjá Svabo 1781 - 82 (*Vaa*) og í fólkateljingini 1801 (*Vaag Bye*). Tá eru 9 (rættari 8) býlingar við 16 húsum í bygdini.

<u>Í Toftum</u> er nevndur í 1584 (*i Vaagetoffthe*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781-82 (*uj Toftum*). Í fólkateljingini 1801 eru 3 hús í býlinginum, í Toftum (*Pladsen Toften*) 1 hús og í Sjurðhúsi (*Pladsen Siurhuuse*) 2 hus.

<u>Hvanndalshús</u> er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Quandalshuus*). Býlingurin er nevndur í jarðarbókini í 1721 (*Quernhuus*), men í 1781 - 82 sigur Svabo, at býlingurin (*Kvandalshus*) er avtoftaður. Í fólkateljingini 1801 er tó býlingurin við Hvanndalsá (*Pladsen Qvandalsaae*) nevndur, har er eitt hús, og er tað helst talan um sama býling, sum er bygdur aftur.

<u>Á Oyri</u> er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Paa Ørre*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781 - 82 (*aa Ojri*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen Øre*) eru 2 hús í býlinginum.

<u>Í Brekkugerði</u> er nevndur í 1584 (*Brecke*) og seinni m.a. í 1652 (*Bræcke-gierde*). Í jarðarbókini 1721 er hann nevndur *Breckegierde* og í skriftum frá 1724 eru fólk nevnd at búgva í Brekkugerði. Í 1781 - 82 sigur Svabo, at býlingurin (*uj Brekkugjeri*) er avtoftaður, og hann verður ikki bygdur aftur fyrr enn um 1830.

Í Smillum er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Smørløffue*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781 - 82 (*uj Smidlum*). Eftir fólkateljingini 1801 (*Pladsen Smidlum*) eru 2 hús í býlinginum.

Við Kráir er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Krøije*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781 - 82 (*vi Kraair*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen Kraajer*) eru 3 hús í býlinginum (*vi Kraair*).

Í Kráarbø er ein heyggur, "Tormansgrøv", sum verður hildin at vera gravheyggur.

Við Gjógvará er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Við Gioffueraa*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781 - 82 (*vi Gjógvaraa*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen Gioveraae*) eru 2 hús í býlinginum.

Á Bárafløtti er ikki nevndur í nakrari jarðarbók og kemir ikki fyri, fyrr enn Svabo í 1781 - 82 sigur býlingin (*aa Baarafløtti*) at vera avtoftaðan.

Á Skála er ikki nevndur í nakrari jarðarbók, og kemir ikki fyri fyrr enn hjá Svabo 1781 - 82 (*aa Skaala*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen Sckaale*) er eitt hús í býlinginum.

Við Misá er nevndur hjá Svabo 1871 - 82 (*vi Miisaa*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen Misa*) eru 2 hús í býlinginum.

Á Kirkjukletti er forni kirkjustaðurin í Vági. Eftir tí búsetingarsøguligu vitan, vit í dag hava, eigur bústaður eisini at hava verið her, men einki er nevnt í søguskjølum um tað. Í uppgrivnari mold í kirkjugarðinum eru tó bústaðarleivdir, so sum laðingargrót og brendir steinar, at finna.

Í Krosstoftum er ikki nevndur í søguskjølum, men har sigst bústaður hava verið.

Á Bakka stóðu gróthús, sum eru nevnd í skifti frá 1724.

Á Vágseiði eru gamlar neystatoftir til skjals.

Bøgarðar eru avmerktir á kortinum hjá Born frá 1791. Yngri garðar eru á kortinum frá 1899 og seinni.

## Búsetingin á Nesi

Bygdin á Nesi kemir ikki fyri í miðaldarskjølum og er heldur ikki nevnd við navni í teimum eldru jarðarbókunum fyrr enn í 1705 (*Næs*).

Í jarðarbókini 1584 eru 3 býlingar á Nesi nevndir við navni. Í 1737 eru 6 hús á Nesi (*Næs*): "*16 børn, men en leilænding og 5 fattige Huusmænd*". Svabo nevnir bygdina í 1781 - 82 (*Nees*) við 2 býlingum. Born hevur tó 3 býlingar á korti sínum frá 1791, men í fólkateljingini 1801 (*Byen Næss*) eru 2 býlingar við 2 húsum í bygdini.

Í Sjóvartoftum er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Siøtøffte*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781 - 82 (*aa Sjeuartoftum*). *Pladsen i Siovertofte* er 1 hús í býlinginum. Umleið 1850 vóru húsini flutt nakað niðan, og forna bústaðarøkið liggur nú avtoftað á bakkanum.

Á Jaðri er nevndur í jarðarbókini 1584 (*Paa Jader*) og m.a. aftur hjá Svabo 1781-82 (*aa Jagri*). Í fólkateljingini 1801 (*Pladsen aa Jagri*) er 1 hús í býlinginum.

Við Breitalið er nevndur í jarðarbókini 1584 (*med Brødellerd*) og m.a. aftur í 1652. Síðani kemir hann ikki fyri aftur, fyrr enn Svabo í 1781 - 82 sigur hann (*við Brejdali*) at vera avtoftaðan.

Í Dunsatoftum sigst, at toftir vóru at síggja, men har er ábygt aftur (Er ikki staðarfest).

Bønhústoftir ella Búðatoftir er eitt stað, har toftir skulu vera til skjals. Eisini skal maður liggja grivin har. Bønhúsbyrgi tax. nr. 314, 3/100 kúfóður, er nevnt 1873. (er ikki staðarfest).

Bøgarðar eru avmerktir á kortinum hjá Born frá 1791. Yngri garðar eru á kortum frá 1899 og seinni.

Bygdin í Vági er mett til 49 merkur og 11 gyllin í innangarðs- og uttangarðsjørð. Av teimum eru 6 merkur og 4 gyllin kongsjørð, 10 merkur og 4 gyllin prestagóðs og 33 merkur og 3 gyllin ognarjørð.

### Eftir jarðaruppmátingini hevur bygdin hesar hagar við bøi:

| | |
|---|---|
| A: Toftahagi | 8 merkur og 4 gyllin |
| B: Bjarghagi | 4 merkur |
| C: Botnhagi | 9 merkur, 3 gyllin og 3 skinn |
| D: Núpishagi | 2 merkur og 8 gyllin |
| E: Tórishagi | 5 merkur og 11 gyllin |
| F: Langadalshagi | 4 merkur og 2 gyllin |
| G: Hamrahagi | 4 merkur og 3 gyllin |
| H: Gjógvaráfjall | 6 merkur, 13 gyllin og 6 2/3 skinn |
| I: Fámara | 4 merkur, 9 gyllin og 10 1/23 skinn |

Hagarnir Lambhagi og Tórishagi eru í eldri tíð lagdir saman og verða enn nýttir. Toftahagi er býttur í tvey, innari partur, sum er 5 merkur, og uttari partur, sum er 3 merkur og 4 gyllin.

Bygdin Nes, ið mett er til 11 merkur og 12 gyllin, kom undir Vágs Kommunu í 1936. Neshagi er eisini í tveimum: innari partur er 6 merkur og 4 gyllin og uttari partur er 5 merkur og 8 gyllin.

Vágs Kommuna í dag er sostatt mett til 61 merkur og 7 gyllin. Kommunan umfatar 2100 ha, av hesum eru u.l. 310 ha dyrkað og bygt lendi.

## 1.4. Høvuðstættirnir í skipanini:

Um ein kannar tær føroysku bygdirnar - hvussu tæt liggja í mun til lendi, byggihátt og byggisið - kemur ein skjótt eftir, at vanligt hevur verið at fest búgv framvið ella nærindis áunum.

Høgligt hevur verið fyri húsarhaldið, at vatn hevur runnið í nánd, og hent hevur verið, at rusk og burturkast á ein náttúrligan hátt varð leitt burtur frá býlinginum og út á sjógv.

Hetta hevur serstakliga gjørt seg galdandi í Vági, har tær tríggjar áirnar Gjógvará, Hvanndalsá og Toftá hava knýtt flest allar býlingarnar at sær.

Menningin tey seinastu árini hevur ført við sær, at tað ikki longur er neyðugt at byggja ella búgva nær rennandi vatni.

Ístaðin fyri at áirnar vera verandi meira ella minni opnar kloakkir geva kloakk-reinsiverk og ein útbygd

renovatiónsskipan í dag møguleika fyri, at áirnar kunnu haldast reinar og verða til hugna og prýði í bygdini.

Kloakkirnar skulu í framtíðini ikki renna í áirnar, men framvið áunum oman á sjógv. Í vestara partinum av bygdini er ætlanin at pumpa spillvatnið vesturum oynna ístaðinfyri at lata tað renna út í Vágsfjørð.

Tað verður tí hildi vera rættast, at nýggj byggiøki, har tað yvirhøvur ber til, verða løgd við einum ávísum fráleika fram við áunum, og at lendið ið fram kemur og áin sjálv verður at nýta sum almenn fríøki.

Nýggju bústaðarøkini koma sostatt at vaksa fram millum áirnar, og bygdamyndin kemir at bera dám av kílakendum fríøkjum fram við áunum.

## Miðdeplaøkir

Í Vági hava seinastu árini tvey náturlig miðdeplarøkir tikið skap. Miðskeiðis í bygdini, frá Heilsumiðstøðini á Løðhamri og út til Minnisvarðaøkið, er eitt miðdeplaøkið við handils- og tænastuvinnu og almennum tænastum. Umframt hetta miðdeplaøkið, er økið vesturi við Gamla Skúla eisini at rokna sum miðdeplaøkið við handils- og tænastuvinnum og almennum tænastum. Økini liggja bæði út móti høvuðsvegnum og eru vælegnaði til endamálið, samstundis sum parkeringsviðurskiftini eru góð.

## Øki til almennar stovnar

Í bygdini eru fleiri økir tøk til almenn endamál av ymiskum slagi.

## Handilsgøtan

Framvið vegnum, sum gongur til og frá miðstaðarøkinum, er ætlanin, at handlar, tænastufyritøkur, skrivstovur, almennir tænastustovnar og tílíkt virksemi kemir at verða, soleiðis at vegurin fær ein dám sum handils- og tænastugøta.

## Vinnuøki

Ídnaðar- og vinnuvirksemi, goymslur og verkstaðir kunnu byggjast á havnaøkinum báðumegin vánna, ella á vinnuøkinum við Tormansá.

# 2. FYRITREYTIR

## 2.1. Lóggáva:

1. Býarskipanin og byggisamtyktin eru gjørdar sambært Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013.

2. Av øðrum lógum og kunngerðum, ið hava týdning fyri býarskipanina og byggisamtyktina, kunnu nevnast:

Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

Løgtingslóg nr. 19 frá 16.sept. 1948 um friðing av fornminnum og bygningum

Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving

Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd

Kunngerð nr. 45 frá 9. mai 1992 um brunaverju og brunatrygd.

Løgtingslóg nr. 60 frá 15 mai 2012 um bygging.

Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008.

Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009.

3. Býarskipanin skal samskipast við hesar lógir og aðrar skipanir. Av serligum týdningi eru landsvega- og havnalagsskipan, tele- og el-veitingarskipan og aðrar landsumfatandi ætlanir, so sum útbygging av skúla- og heilsuverki.

## 2.2. Náttúruviðurskifti

Náttúran í Vági minnir í høvuðsheitinum um aðrar fjarða- og eiðisbygdir í Føroyum. Tó gevur tað vakra Vágseiðið og Vatnið bygdini ein sermerktan dám, og hildið verður beinast, at øll bústaðarbygging verður løgd eystanfyri Vatnið. Hitt bratta lendið, sum eyðkennir fjarðasíðurnar báðumagin fjørðin, kemir óivað í framtíðini at avmarka byggingina í støðum.

Framvið Gjógvará og norður í Dalin er vøkur náttúra. Her eigur lendið at vera óbygt.

## 2.3. Fólkatal og fólkavøkstur

Fólkatal í Vági:

| Ár | 1953 | 1960 | 1970 | 1980 | 1984 | 1990 | 1999 | 2002 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal | 1.824 | 1.739 | 1.554 | 1.776 | 1.755 | 1.665 | 1.402 | 1.436 | 1.333 |

Á tølunum sæst at fólkatalið er sera ójavnt, og er minkað nógv síðan miðskeiðis í 1950unum. Seinastu 3-5 árini hevur fólkatalið ligið millum 1.300 og 1.350 fólk

## 2.4. Friðingarviðurskifti

1. Friðingarlinjur sambært náttúrufriðingarlógini:

Innangarðs:

100 m frá valling/bakkatrom í fjøru.

300 m frá viðalundum.

300 m frá vøtnum størri enn 1 ha og áum breiðari enn 4 m.

Til broytingar uttangarðs krevst altíð loyvi frá friðingarnevndini.

Økið kring Vatnið og eystur móti býlinginum við Kráir er friðað øki, men verður tó mett sum landbúnaðarøki, við serstakari støðu, samsvarandi friðingarlógini. Í hesum øki er Tormansgrøv, ið er friðað sambært lóg um friðing av fornminnum.

Á Vágseiði eru neystatoftir og økið uttanum friðað, sambært lóg um friðing av fornminnum.

Føroya Fornminnissavn hevur gjørt fyribilsávísingar av fornum bústøðum í kommununi, hesi eru sýnd á plani 1:4000. Lendið undir hesum bústøðum er friðað, verandi bygningar eru tó undantiknir.

# 3. BÝARSKIPAN

## 3.1. Býarskipanartíðarskeið og stigbýti:

Býarskipanin vísur hvussu vøksturin og útbyggingin av kommununi komandi árini í høvuðsheitinum eigur at fara fram.

Bygt eigur at verða í stigum, soleiðis at ein økispartur verður útbygdur, áðrenn farið verður undir tann næsta. Hetta hevur týdning fyri gerð av vegum, kloakk-, vatn-, el- og televeitingum og eisini fyri bygdamyndina sum heild. Somuleiðis kann ætlaða nýtslan av einum øki betur broytast, um fyritreytirnar broytast.

## 3.2. Bústaðartørvur:

Ein meting av bústaðartørvinum byggir á hesar fyritreytir:

1. Fólkatalið í 2030 verður uml. 1.800 fólk
2. Hvørt húski fær sín bústað.
3. Húskisstøddin verður mett at verða umleið 3,25 fólk pr. húski.

Hetta gevur eitt samlað bústaðartal í býnum uppá umleið 550 í 2030.

### Eldraíbúðir, eldrasambýli og vardaríbúðir og -verkstøð o.t:

Við vaksandi tali av eldri, verður væntandi eisini ein vaksandi tørvur á eldraíbúðum og møguliga eisini av eldrasambýlum. Ein uppraðfesting av at nøkta tørvin hjá øllum borgarum í samfelagnum merkir eisini, at ein øktur tørvur verður á at byggja vardar íbúðir, og møguliga eisini av at byggja fleiri vard verkstøð.

Íbúðirnar eiga sum heild at verða lagdar millum sethús, meðan vard verkstøð kunnu antin leggjast millum sethús ella á øki fyri almennar stovnar.

### Smávirkir

Her verður hugsað um smærri atvinnur sum: Seymistovur, bindistovur, vevstovur, smærri umvælingarstøð, roknskaparvirkir v.m., ið eisini verða løgd inn í bústaðarøkið.

### Spælipláss

Spælipláss fyri smærri børn verða løgd við passandi fráleika millum sethúsagrundirnar. Hvar og hvussu hesi skulu liggja, verður víst fyri hvørja einstaka útstykking.

## 3.3. Bústaðarøki A og B:

Økini, ið eru løgd til sethúsabygging, eru sýnd á plani 1:4000 og eru nevnd A og B øki. A er verandi býurin og B er nýggju bústaðarøkini.

Víddirnar á bústaðarøkjunum eru hesar:

Bústaðarøkið A er umleið 257.450 $m^2$.

Bústaðarøkið B er umleið 700 $m^2$.

Bústaðarøkið B1 er umleið 56.950 $m^2$.

Bústaðarøkið B2 er umleið 9.000 $m^2$.

Bústaðarøkið B3 er umleið 13.100 $m^2$.

Bústaðarøkið B4 er umleið 63.200 $m^2$.

Bústaðarøkið B5 er umleið 12.360 $m^2$.

Bústaðarøkið B6 er umleið 25.550 $m^2$.

Bústaðarøkið B7 er umleið 42.250 $m^2$.

Bústaðarøkið B8 er umleið 84.400 $m^2$.

Bústaðarøkið B9 er umleið 50.500 $m^2$.

Bústaðarøkið B10 er umleið 37.800 $m^2$.

Bústaðarøkið B11 er umleið 5.650 $m^2$.

Bústaðarøkið B12 er umleið 2.650 $m^2$. og verður lagt út í serstakari byggisamtykt.

Bústaðarøkið B71 er avsett til sambýli og eldraansing umleið 10.000 $m^2$.

B72 er avsett til eldrabústaðir o.t. umleið 5.650 $m^2$.

Bústaðarøkið B er íalt umleið 413.900 $m^2$.

Samlaða bústaðarøki í Vági, A og B økir er umleið 671.350 $m^2$

## 3.4. Øki til almenn endamál C

C Avlagt til alment endamál (gamla grótbrótið niðan á Eggjar) umleið 1.150 $m^2$.

C1 Avlagt til barnagarð umleið 8.050 $m^2$.

C2 Skúlar, kirkja og svimjihøll umleið 10.850 $m^2$.

C3 Minnisvarðar og “Undirhús” umleið 3.150 $m^2$.

C4 Kirkjugarðar umleið 13.000 $m^2$.

C5 Vardur Verkstaður umleið 4.000 $m^2$.

C6 Miðstaðarøki á Løðhamri, spælipláss o.a. Serstøkbyggisamtykt verður gjørd fyri økið. umleið 9.700 $m^2$.

C7 Tøkt til almenn endamál og bústaðarbygging innan eldraøkið umleið 18.950 $m^2$.

C8 Brand & Bjargingarstøð umleið 1.500 $m^2$.

C9 Samkomuhús, bústaðir og handlar umleið 3.950 $m^2$.

C10 Bátahavn, handlar, neyst og virkir í ikki dálka. umleið 13.000 $m^2$. Serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

C-økið samanlagt umleið 87.250 $m^2$.

## 3.5. Havna- og vinnuøki D

D1 Havna- og vinnuøki umfatar í dag bryggjupláss til rutusamband, bátapláss og øki til fiskavirkir. Harafturat kemur øki til skipasmiðju. Havnaskrivstovan er á hesum økinum. Økið er á norðaru síðu av Vágsfirði og strekkir seg frá Galtnaroyruni til skipasmiðjuna.

Víddin av D1-økinum er umleið 99.850 $m^2$.

D2 Á suðursíðuni er eitt havna- og vinnuøki avlagt. Her verða serstakliga bygd virkir, ið ikki hava við fiskaviðgerð at gera.

Víddin av D2-økinum er umleið 429.650 $m^2$.

D3 Hetta økið er lagt av á suðursíðuni omanfyri gamla landsvegin beint vestanfyri Tormansá.

Víddin av D3-økinum er umleið 11.850 $m^2$.

D4 Hetta økið er lagt av á suðursíðuni niðanfyri landsvegin frá Nýpið inn móti bygdamarkinum í Lopra, og út á sjógv, sum víst á kortskjalinum.

Víddin av D4-økinum er umleið 68.000 $m^2$.

D-økið samanlagt umleið 609.300 $m^2$.

## 3.6. Neystaøki E

Hesi økini eru løgd til at vera neystaøkir:

Á sunnaru síðu á fjørðinum, niðanfyri landsvegin frá gamla bøgarðinum vestur til Ósan umleið 8.800 $m^2$.

Frá Garðabrúgv eystur til gamla kirkjugarð umleið 2.000 $m^2$.

Frá miðstaðarøkinum á Løðhamri til Vágs Skipasmiðju umleið 1.250 $m^2$.

Frá Galtnaroyrunu eystur til matr.nr.77a umleið 3.550 $m^2$.

Við lendingina á Nesið niðanfyri matr.nr.19d umleið 1.100 $m^2$.

Á Vágs Eiði millum matr.nr.27 og matr.nr.333c umleið 2.350 $m^2$.

E-økið samanlagt umleið 19.050 $m^2$.

## 3.7. Frílendi F

Lendið millum bústaðarøkini, framvið áunum og annars har tað er sýnt í fylgiskjali nr. 6.1, mát 1:5000 skal varveitast sum frílendi.

F-økið samanlagt er umleið 367.200 $m^2$.

## 3.8. Ítróttar og frítíðarøki G

Økið er avlagt vestanfyri Vatnið, har vøllurin er og væntandi verður meira ítróttar- og frítíðarvirksemi her.

G-økið samanlagt umleið 58.700 $m^2$.

## 3.9. Landbúnaðarøki

Landbúnaðarøki umfatar tað økið, sum ikki er avlagt til annað endamál og verður tað umframt til landbúnað nýtt til til grótbrot, fiskaalistøð o.t. Eisini kunnu partar av frílindinum sum eru dyrkaðir, nýtast til landbúnað.

## 3.10. Friðað økið H

Økini, ið er friðaði, er sýnd á fylgiskjali nr. 6.1, mát 1:4000. Fornir bústaðir, gravir o.t. eru sýndir við skravering.

H og H1 eru økir, sum rundanum Vatnið og eystur ímóti Kráarvegi, og við viðalundina í Hvannadali. Økið er umleið 123.150 $m^2$ til víddar.

H2, sum liggur á Vágs Eiði er umleið 2.900 $m^2$ til víddar.

H-økið samanlagt umleið 126.050 $m^2$.

## 3.11. Økið til frítíðarhús I

Økið er avlagt til summar- og frítíðarhús umleið 51.800 $m^2$.

## 3.12. Veitingar:

**Elveitingin**: Vágs Kommuna fær el frá tveimum el-verkum sum bæði liggja í Vágs Kommunu. Eitt vatnrikið el-verk er í Botni og eitt oljurikið el-verk er á Oyrunum í Vági.

**Vatnveitingin**: Størsti parturin av húsunum, umleið 80%, og havnalagið fáa vatn frá kommununi. 20% av húsunum fáa vatn frá privatum vatnfelag.

Tvey vatnreinsiverk eru í kommununi, eitt omanfyri Marknoyri, sum varð tikið í nýslu 1990 og sum kann reinsa 60 t/tíma, og eitt við Gjógvará, tikið í nýtslu 2000 og sum kann reinsa 60 t/tíma.

**Kloakkveitingin**: Høvuðsreglan er at øll sethúsini skulu hava rottanga.

Kommunan hevur eitt kloakkpumpuverk, sum pumpar kloakkvatn vestur um oynna. Sum er verður pumpað frá sethúsum í vestara parti av býnum, Vágs Høll og VB-húsinum. Í góðkendu spillvatnsætlanina fyri Vágs kommunu er ætlan gjørd fyri hvussu kloakkvatn frá øðrum bústaðum, stovnum og virkjum skal leiðast út á streyma sjógv

# 4. BYGGISAMTYKT

## 4.1. Byggivaldið:

1. Byggivaldið og útinning tess í Vágs Kommunu hevur býráðið sambært Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

## 4.2. Øki, sum byggisamtyktin hevur gildi fyri

1. Hendan byggisamtykt hevur gildi fyri alla Vágs Kommunu.

2. Ásetingarnar í samtyktini galda:

a. Nýggja bygging.

b. Umbygging ella bygging afturat byggingum sum eru.

c. Broyting í nýtslu av bygging, sum er og bygging sum hevði komið undir hesa samtykt, um hon var nýbygging.

d. Byggingar, sum eru, tá tær einstøku reglurnar beinleiðis heimila tí.

3. Til bygging verður roknað:

a. Fastar konstruktiónir og virki, sum eftir fyritreytunum í byggisamtyktini eru at skilja sum bygging.

b. Konstruktiónir, ið kunnu flytast eitt nú tjøld, bátar, vognar ella tílíkt, tá ið nýtsla teirra sum bygging ikki bert er fyribils.

c. Tangar, kranar, flutningsbrýr, pallar og aðrar konstruktiónir í tann mun, sum býráðið heldur vera náttúrligt, tá ið hugsa verður um almennan tryggleika, skil, heilsu ella onnur viðurskifti, sum byggisamtyktin er ætlað at røkja.

4. Byggingar, sum eru, mugu ikki við broyting, um- ella afturat bygging, hækkan ella á annan hátt verða broyttar, soleiðis at tær stríða ímóti galdandi reglum ella, um so skuldi verið, fara at stríða enn meira ímóti hesum reglum, enn tær longu gera.

5. Skulu byggingar, sum eru, verða umvældar ella broyttar so nógv, at øll byggingin verður endurnýggja (høvuðsumbygging), skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at byggingin, í tann mun tað er gjørligt fylgir teimum reglum, ið galda fyri nýbygging.

6. Nýbygging, broytingar, um- ella afturatbyggingar og høvuðsumbygningar skulu umframt at lúka treytirnar í hesi byggisamtyktini eisini vera í samsvari við: møguligar býarskipanir, serligar byggisamtyktir, sertreytir og lógir annars.

## 4.3. Byggiumsóknir

1. Bygging, ið kemir undir reglurnar í byggisamtyktini, má ikki fara fram, uttan at skrivligt loyvi frá byggivaldinum er fingið til vega.

2. Allar útstykkingar- og byggiumsóknir heruppií umsóknir um at grava fyri grund, til møguligar spreingingar, meiri týðandi broytingar, eitt nú at broyta skap og konstruktión, seta upp eldstaðir, taka niður ella flyta hús, vega-, kloakk- og frárenningararbeiði, skulu verða sendar býráðnum.

3. Umsókn skal vera skrivlig og viðløgd henni skulu vera, tær tekningar og upplýsingar sum eru neyðugar fyri at avgerð kann takast í málinum.

4. Tekningar og útrokningar skulu verða gjørdar av fólki, sum eru før til tess, av arkitektum, byggifrøðingum, verkfrøðingum, teknikarum ella øðrum, sum byggivaldið heldur hava nóg góðan kunnleika til tess og um tekningar og útrokningar teirra lúka tey krøv, ið vanliga verða sett til tekniska projektering.

5. Allar tekningar, planir, frágreiðingar, útrokningar o.t. fylgiskjøl saman við byggiumsókn skulu vera dagfest, hava matr. nr. á ognini og hann, ið uppsett tey hevur, skal skriva undir. Hesin hevur ábyrgd av at tey eru fullgóð.

6. Sum fylgiskjøl við umsóknini um húsabygging skulu vera hjáløgd:

> a. Støðuplanur 1:250 / 1:500, sum vísir stødd og skapilsi á byggigrundini, hvussu hon vendir ímóti gøtum og ættum, hvar og hvussu ætlað hús skulu standa og ætlaða vatnburturveiting. Støðuplanurin skal soleiðis geva upplýsingar um verandi og framtíðar hæddarstig á grundini og um tað verður hildið neyðugt fyri at avgreiða málið, hæddarstigini á grannagrundunum.
>
> b. Flatmyndir av húsunum í máti í minsta lagi 1:100 við áskrivaðum mátum, bæði høvuðsmátum og gjøgnumgangandi stakmátum. Skilast skal til, hvat rúmini eru ætlaði til. Berandi konstruktiónir skulu vera teknaðar og sperrurnar vístar, eisini skulu dyr, saniterar innleggingar o.a. verða teknaðar.
>
> c. Tvørskurðir í minsta lagi 1:50, sum neyðugir eru fyri at fáa eina fatan av húsinum og tekningar av øllum útsíðum á húsunum.
>
> d. Frágreiðingar sum saman við tekningum geva fullfíggjaða og greiða lýsing av teirri ætlaðu byggingini.

7. Byggivaldið kann skipa fyri at stakprojekteringar saman við útrokningum skulu vera til taks og innsendar til góðkenningar, áðrenn bygging verður byrjað.

8. Umsóknir við tekningum, frágreiðingum og útrokningum - heruppi í ein útrokning av byggistiginum ella nettonýtslustiginum - og onnur fylgiskjøl skulu verða innsendar í tveimum eintøkum og skulu hava allar upplýsingar, sum neyðugar eru fyri greitt at skilja og fáa viðgjørt tað, sum søkt er um.

Frávik frá lógum, samtyktum, servituttum og øðrum fyrisetanum - her uppi í møguligar býarskipanir - skulu nágreiniliga verða tilskilað og samstundis skal verða upplýst um loyvi til frávik er fingið. Slík frávik eru bert roknað fyri játtað, tá tey hava verið nevnd í umsóknini og og tilskilað er í byggioyvinum, at tað

neyðuga loyvið ella undantaksloyvið er givið, sí 9. gr.

9. Byggivaldið kann, tá ið býráðið heimilar tí, játta umsóknini, tá ið hon er innanfyri reglurnar í galdandi byggireglugerð og málið annars ikki er víttfevnt ella hevur grundregluligan týdning. Tó skal málið verða lagt fyri býráðið til kunningar.

10. Byggivaldið skal leggja málið fyri býráðið, tá ið umsóknin ikki beinleiðis kann verða játtað sambært reglunum í byggisamtyktini ella málið er víttfevnt ella hevur grundregluligan týdning.

11. Byggivaldið og býráðið kunnu krevja at fáa allar neyðugar upplýsingar til tess at kunna gera eina fullgóða meting av eini byggiætlan, sum tað hevur fingið til viðgerðar, heruppií - har umstøðurnar tala fyri tí - eina heildarbyggiætlan fyri avvarðandi virki ella ogn.

12. Tá byggimálið er viðgjørt skal byggivaldið siga umsøkjaranum frá teirri endaligu avgerðini.

13. Í málum viðvíkjandi bygging av niðanfyri nevnda slag, skal álit frá byggi valdinum verða til skjals hjá býráðnum áðrenn byggiloyvi verður givið.

Kirkjur, leikhús, gistingarhús, sjúkrahús, hús ætlað til undirvísingar, framsýningar, ella til stuttleika eins og størri hús til ídnaðar, goymslu, verkstaðar- og handilsvirki og yvirhøvur hús ella størri høli, har nógv fólk kemur saman.

Í nevndu málum kann byggiloyvi verða givið treytað av at tey lúka øll krøv viðvíkjandi gerð, heilsu, eldvanda, umhvørvi ella býarskipan.

Tey krøv sum byggivaldið møguliga setir av tílíkum slag, sambært galdandi reglum, eru bindandi fyri býráðið.

## 4.4. Byggiloyvi og byggiváttan:

1. Byggiloyvi skal vera skrivligt. Makaskjal av byggiloyvinum skal vera goyma á skjalasavninum hjá kommununi.

2. Loyvi kann vera avmarkað til bert at fata um fyrireikingar til bygging: grevstur fyri grund, spreinging, javnan av lendi, stoyping av undirstøði, vega-, kloakk- og frárenningararbeiði o.s.fr.

3. Loyvið er tíðarbundið til 2 ár. Um ikki verður bygt innan 2 ár kann byggivaldið krevja at nýtt byggiloyvi verður fingið. Byggivaldið kann nokta at geva nýtt byggiloyvi um grundir eru til tess.

4. Áðrenn farið verður undir arbeiði, skal fráboðan verða givin byggivaldinum í góðari tíð og í loyvinum kunnu verða settar treytir um at fráboðanin skal vera skrivlig.

5. Fyri at geva byggiloyvi kunnu verða settar neyðugar treytir viðvíkjandi dálking, umhvørvi, inngirðing, konstruktión, hvussu skipað er fyri tilkoyring, frárenning frá vegum, túnum v.m.

Byggiloyvið kann somuleiðis verða treytað av trygdartiltøkum (eitt nú girðing, skorðum, skjóltekjum o.ø.).

6. Um so er, at í byggiloyvinum eru tilskilaði krøv um, at ásetingar, ið ikki standa í byggisamtyktini, skulu verða loknar, skulu tílík krøv verða tilskilaði saman við upplýsing um hemildina fyri teimum og um so

er, at krøvini eru sett av øðrum myndugleika enn byggivaldinum, upplýsing um hetta og um, hvaðar ein kæra um hesi krøv kann verða send - og møguliga innanfyri hvørja freist.

7. Áðrenn bygging verður tikin í nýtslu, skal verða boðað byggivaldinum frá og váttan tess - byggiváttan - fáast um, at byggingin í tann mun staðfesting hevur verið gjørlig, er gjørd í samsvari við byggisamtyktina og tær serstøku treytir, ið settar vóru, tá ið byggiloyvi varð givið.

Ein fingin byggiváttan forðar ikki byggivaldinum í at kunna krevja, at frávik, ið seinni verða funnin, verða rættaði.

8. Áðrenn byggiváttan verður skrivað, skal byggivaldið ansa eftir:

at møguligt álit frá frá Heilsunevndini verður fylgt.

at frárenning, kloakk og vegur eru í lagi.

at møguligt ummæli frá Brunanevndini verður fylgt og

at einki er til hindurs fyri at reinsa skorsteinar, eldstaðir og roykrør.

## 4.5. Umsiting og niðurtøka av bygging

1. Ein og hvør bygging skal í øllum lutum og við øllum tí, ið hoyrir til, altíð verða forsvarliga hildin og í hampuligum standi. Er byggingin ov illa umsitin, kann byggivaldið áleggja eigaranum at bøta um brekini og um neyðugt lata tey umvæla fyri hansara rokning.

2. Verður hildið verða vandamikið at búgva í einum húsum, kann byggivaldið krevja at flutt verður úr teimum.

3. Tað er ikki loyvt at fara undir at taka niður bygging, uttan at loyvi er fingið frá byggivaldinum. Í umsókn um slík loyvi skal verða skilað til, hvussu høg (hæddir) og víð (vídd á húsagrund) byggingin er.

4. Niðurtøku- og byggiarbeiði skulu fara fram á tryggan hátt og samsvarandi teimum fyriskipanum, sum býráðið í tí einstaka førinum gevur, eisini tá ið ræður um at beina burtur ella hylja undirstøði o.a., eisini á vegaøki.

5. Hevur bygningur innleggingar til frárenningar, vatn, ravmagn, telefon ella tílíkt, er ikki loyvt at fara undir arbeiðið, fyrrenn avvarðandi myndugleiki ella felag hevur fingið boð um hetta, uttan so at arbeiðið verður gjørt av alment góðkendum handverkarum.

## 4.6. Trygdartiltøk, meðan bygt verður:

1. Tá ið grivið ella sprongt verður fyri grund, skal tann, ið byggir seta øll neyðug trygdartiltøk í verk fyri at skaði ikki skal henda.

2. Hevur múrur ella onnur bygging, skotist soleiðist ímóti marki at annanmans ogn, at hesin hevur ampa av tí, er byggivaldinum heimila at gera fyriskipan til tess at seta tey neyðugu trygdartiltøkini í verk.

## 4.7. Revsing fyri at bróta fyriskipanirnar í byggisamtyktini, atgonguheimild og trygging av ásetingunum

1. Sektaður verður:

a. Hann sum, uttan fyrisett loyvi, setur arbeiði, sum kemir undir fyriskipanirnar í byggisamtyktini í verk.

b. Hann, sum ikki gevir byggivaldinum boð, sum fyrisett er.

c. Hann, sum nýtir bygging uttan fyrisetta váttan.

d. Hann, sum tálmar eftirkanning, ið er heimilað í lóg.

e. Hann sum ikki ger eftir lógliga frásøgdum boðum.

f. Hann sum ikki ger tey umsitingararbeiði, sum byggivaldið hevur álagt og sum eru neyðug, til tess at sleppa undan at vandamikið verður hjá teimum sum búgva í húsunum ella hjá øðrum.

g. Hann sum brýtur fyriskipanir í hesi almennu byggisamtykt og aðrar serligar fyriskipanir, sum landsstýrið hevur góðkent, uttan at brotið kann verða talt undir a-f.

2. Tá ið revsingin verður ásett, skal verða havdur í huga tann fíggjar vinningur, ið fingin er ella varð ætlaður at verða fingin av ólógliga gjørda arbeiðinum.

3. Rættarábyrgd fyri ólógliga bygging hevur tann, ið staðið hevur fyri arbeiðinum ella hann í gjørt tað hevur, eftir umstøðunum báðir. Hann sum hevur latið arbeiðið gera, verður bert gjørdur ábyrgdugur, tá ið hann ikki veit at siga nakran annan, sum kann verða kravdur at hava rættarábyrgd, ella tá ið hann hevur verið við í brotinum og hevur vitað ella gruna um tann ólógliga atburðin.

Rættarábyrgdin kann tá eftir umstøðunum falla burtur mótvegis teimum, sum nevndir eru í fyrsta setningi.

4. Tann sum eigur eina ogn hevur skildu at rætta tað sum er ólógligt á henni.

5. Ger eigarin ikki eftir boðum, hann hevur fingið, kann við dómi verða álagt honum at rætta viðurskiftini, áðrenn tann ásetta tíðin er umliðin og kunnu dagbøtur verða álagdar honum.

6. Snýr brotið seg um nýtslu av ognini og eigarin hevur givið nýtaranum tey neyðugu boðini um skyldurnar, hevur nýtarin ábyrgdina.

7. Tá ið ikki verður gjørt eftir skyldu, sum er áløgd við dómi, til at rætta ólóglig viðurskifti, áðrenn ásetta tíðarfreistin er farin og tá ið innheinting av sektum, sum dømdar eru sambært 1. stk., ikki verður hildin at fáa tað ætlaða úrslitið, kann byggivaldið krevja hjálp frá løgregluni, til at fáa atgongd til at gera tað, sum byggivaldið heldur vera neyðugt fyri at viðurskiftini skulu vera lóglig, møguliga til niðurtøku.

8. Ongum er heimilað at nokta starvsfólki byggivaldsins ella umboðsmanni tess atgongd, tá ið teir við fullgóðum heimildarprógvi, koma til eina ogn at kanna eftir,um og í hvønn mun ein bygging er í samsvari við galdandi lóg og um ásetingarnar í samtyktini eru hildnar.

9. Verður farið undir arbeiði, sum kemir undir ásetingarnar í hesi samtykt, uttan at fyrisett loyvi er

fingið, kann byggivaldið krevja, at løgreglan beinanvegin setur bann fyri, at hildið verður fram við hesum arbeiði.

10. Reglur, reglugerðir, skipanir og ásetingar gjørdar sambært hesi samtykt, ella ásetingar bundnar at tí einstaka byggiloyvinum skulu vera at rokna fyri partar av byggisamtyktini og hava somu vernd sum hon.

## 4.8. Undantaksloyvi

1. "Byggivaldið kann geva smávegis léttar í ásetingunum í hesi byggisamtykt, tá ið tað snýr seg um mál av lítlum týdningi.

2. Áðrenn loyvi til léttar kann verða givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi tvær vikur frá tí teir hava fingið boðini."

## 4.9. Kæra

Loyvt er at leggja tær avgerðir, sum býráðið hevur tikið sambært hesi almennu byggisamtykt og teimum serstøku byggisamtyktunum, fyri landsstýrið.

2. Tá ið annað ikki er fyrisett, er kærufreistin 30 dagar frá tí degi, tann avvarandi fekk avgerðina at vita og upplýsing um hesa freist og um, hvat vald kært kann verða til. Fyri avgerðir, sum alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.

3. Kæra um boð, sum byggivaldið hevur givið, frítekur ikki frá at gera eftir teimum, tó er kæruvaldinum heimilað at áseta, um kæra skal leingja um freistina.

Sakarmál, til tess at royna avgerðir, sum tiknar eru av Landsstýrinum sambært tí almennu og teimum serstøku byggisamtyktum, skal verða reist, áðrenn 6 vikur eru gingnar frá tí degi, tá ið avgerðin er fráboðað tí avvarðandi.

Viðvíkjandi avgerðum, sum alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.

## 4.10. Frárenning og vatnveiting

### Frárenning

1. Tá ið byggivaldið einki annað hevur góðkent, skal hvør nýggj bygging hava fullgóða frárenning bæði til skiti vatn, regnvatn, omanávatn og grundvatn.

2. Byggivaldinum er heimilað, nær tað so er, at krevja framd tey neyðugu tiltøk, ið nevnd eru í byggiloyvinum. Ger hetta tað neyðugt, at frárenning verður løgd um annanmans grund, skal húsaeigarin vissa sær, at tær neyðugu avtalurnar um hettar verða tinglisnar á avvarðandi ognir.

3. Tá ið undirstøði verða gjørd tætt við ella yvir leiðingum, sum liggja frammanundan, skulu hesar verða

vardar, og atgongd til reinsingar, møguliga til at leggja tær berar, skal verða tryggjað á slíkan hátt, sum byggivaldið góðkennir.

4. Tá ið kanningar verða hildnar vera neyðugar, til tess at finna orsøkina til brek á frárenning, kann byggivaldið lata gera tey arbeiði, sum neyðug eru, bæði á avvarðandi ogn og á grannaognum.

Verða tá funnir løstir ella brek, ið heilt ella lutvíst ætlast at vera atvoldin til ólagið, skal tann, sum er atvold til ólagið endurgjalda byggivaldinum eftir rokning tær útreiðslur, sum standast av teimum gjørdu kanningunum og arbeiðunum.

5. Gerð og nýtsla av frárenningum skulu fylgja teimum fyriskipanum og lúka tær treytir, sum byggivaldið, eftir samráðing við Teknisku Nevndina setir.

6. Ein kloakk má ikki verða nýtt á annan hátt, enn ætlað var, tá hon varð gjørd, sum til dømis at veita í hana skaðilig evnir ella løgir.

7. Reglurnar í 4., 5. og 6. stk. Hava eisini gildi fyri frárenningar, sum eru frammanundan.

8. Kravt kann verða, at frárenningar og frárenningarútbúðnaður, sum er frammanundan, innanfyri tíðarfreist, sum byggivaldið setir, verður fingin at samsvara við fyriskipanirnar í pkt. 1 í hesum kapitli.

9. Ásetingarnar omanfyri skerja ikki rættin hjá Teknisku Nevndini til, sambært heilsusamtyktini, at krevja verandi frárenning broytta av heilsugrundum.

### Vatnveiting

Áðrenn farið verður undir nýggja bygging skal byggivaldið ansa eftir at hon hevur, nóg góða og nóg trygga veiting av drekkivatni.

2. Góð atgongd skal altíð vera til vatn til eldsløkkingar.

## 4.11. Ásetingar fyri økispartarnar, byggistig og nettonýtslustigi

Ásetingarnar fylgja sundurbýtingini í nýtsluøkjir, sum býarskipanin fastsetur, sí fylgiskjal 6.1 dagfest 25. jan. 2016 í máti 1:4000.

Útstykkingar kunnu bert fara fram eftir útstykkingarætlanum, sum býráðið hevur góðkent fyri náttúrliga avmarkaði økir.

### Útrokning av byggistigi:

Største loyvda bygging á grundstykki verður avgjørd, sum lutfallið millum víddina á húsagrundini og víddina á grundstykkinum.

Talið, sum á hendan hátt kemir fram, verður nevnt byggistigið.

## Útrokning av nettonýtslustigi:

Størsta loyvda gólvvídd á húsum verður avgjørd, sum lutfallið millum samlaðu gólvvíddina, í øllum húsahæddum, í húsunum og víddina á grundstykkinum.

Talið, sum á hendan hátt kemir fram, verður nevnt nettonýtslustigið.

Víddin á hvørjari einstakari hædd verður roknað frá útsíðunum á útveggjunum.

Eldverjuveggur ella tílíkir veggir, ið tvey hús hava í felag, verða roknaðir hvørjum húsum til helvtar av veggjartjúktini.

Kjallari (niðasta hædd) ella partur av kjallara, sum kann nýtast til búrúm, verður taldur uppí við 50% av gólvvíddini.

Víddin av loftshæddum, sum kunnu verða nýttar, verður roknað til 50% av hæddini beint undir teimum.

Bilhús, úthús og hjallar verða bert roknaði uppí hæddavíddina við tí vídd sum fer uppum 35 $m^2$.

Økini, ið eru løgd til sethúsabygging, eru sýnd á plani í máti 1:4000 og eru nevnd A og B øki. A er verandi býurin og B nýggju bústaðarøkini.

## Ásetingar fyri Bústaðarøkið A 1

1. Økið umfatar ta gomlu bygdina og verður økið varðveitt sum bústaðarøkið. Tó er loyvt at nýta hús til handlar, smærri vinnuendamál og stovnar, treytað av at hetta ikki er til ampa (t.d. økt bilferðsla og økt dálking) ella lýtir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

2. Á grundstykkjum smærri enn 300 $m^2$verður byggiloyvi ikki givið til nýbygging.

Byggistigið má ikki fara uppum 0,5.

Nettonýtslustigið fyri grundstykki, 300 $m^2$ til víddar, verður sett til 0,6 og lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjavídd til 0,5 fyri grundstykkið 500 $m^2$ og størri.

Býráðið kann loyva frávik í samband við smærri uppíbyggingar av verandi ognum.

3. Um verandi bygging á grundstykkjum smærri enn 500 $m^2$ verður niðurtikin kann býráðið loyva, at nýbygging fer fram í somu stødd sum undanfarna bygging, treytað av at hetta ikki er til ampa fyri grannaognir.

4. Er grundstykkið 500 $m^2$ ella størri og tá talan er um umbygging, tilbygging ella úthúsabygging, skulu ásetingarnar fyri økispartin B1 - B10 haldast.

5. Hús mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønuna, mált frá miðaljørðildi. Byggivaldið ásetur hæddina á lægsta gólvi.

6. Eftir góðkenning frá byggivaldinum verður loyvt at umvæla verandi sethús og byggja afturat teimum, t.d. dur, baðirúm o.t., so tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.

7. Innan skravera økið (fornur bústaður), er ikki loyvt at byggja ella grava í lendinum uttan at Føroya Fornminnissavn og byggimynduleikarnir geva loyvi til tess.

## Tilhaldspláss

8. Í sambandi við sethús skal verða tryggjað eitt tilhaldspláss, sum í minstalagi er eins stórt og samlaða hæddarvíddin á sethúsunum.

Í eldri býlingum kann byggivaldið geva fyribils lættar, viðvíkjandi hesum reglum, tá mett verður at nógmikið av almennum uttandura tilhaldsplássi er í nærøkinum.

Byggivaldið kann krevja, at til eitt bústaðarøki skal fáast til vega eitt nógstórt opið øki - einans ætlað til tilhaldsstað og spælitún hjá børnum.

Í sambandi við bygging, sum heilt ella fyri ein part verður gjørd til vinnulig endamál, kann byggivaldið krevja, at gjørt verður serligt tilhaldspláss til teirra, sum arbeiða í fyritøkuni.

## Gerð og umsiting av tilhaldsplássi

9. Ikki er loyvt at nýta tey óbygdu økini, sum eru avløgd og góðkend sum tilhaldspláss, til annað enn tað tey eru avløgd til.

Tilhaldspláss, spælitún og økir, sum eru ætlaðið til ferðslu hjá teimum, ið nýta byggingina ella øðrum, skulu verða hildin í góðum standi, so tey vandaleyst kunnu nýtast til tað, tey eru ætlaðið.

Byggivaldið kann seta neyðug umsitingararbeiði í verk fyri rokning eigarans.

## Øki til parkeringspláss

10. Nóg stórt øki skal verða lagt av til parkeringspláss, soleiðis at íbúgvar, starvsfólk, vitjandi, útvegamenn og onnur fáa sett motorakfør síni frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.

Fyri hús, ið heilt ella fyri ein part verða nýt til bústað, galda um annað ikki verður kravt av byggivaldinum, hesi minstukrøv til tess at ganga tørvinum á parkeringsplássum á møti.

a. Við sethús, raðhús og ketuhús skal parkeringspláss ella bilhús verða gjørt til í minsta lagi ein bil fyri hvønn bústað.

b. Við sethús í fleiri hæddum, ketu- og raðhús, við felags parkeringsplássum, verður avlagt so stórt øki at pláss verður fyri 1,5 bili til hvønn bústað sær.

Við hús, ið heilt ella lutvíst verða nýtt til vinnu, skal parkeringspláss til vinnulig endamál í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldinum, soleiðis at farið verður eftir, hvør vinnan er, tali á starvsfólki og tørvi hjá viðskifta fólki at seta bilar frá sær og tílíkt.

Tó skal í minsta lagi vera eitt parkeringspláss fyri hvørjar 50 $m^2$ av hæddarvíddini í húsunum. Parkeringsplássini skulu verða gjørdir, samstundis sum bygt verður.

Um so er at gjøllari reglur eru ásettar í skipan, gjørd av kommununi, kunnu frávik loyvast.

### Ásetingar fyri Bústaðarøkið B 1 - B 10

1. Loyvt er einans at byggja sethús við í mesta lagi tveimum íbúðum og eftir serloyvi frá byggivaldinum tví-, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski hvørt. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta hølir til handlar og onnur smærri vinnuendamál, treytað av at hesi virkir ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

2. Loyvt er ikki at frábýta grundstykkir smærri enn 500 $m^2$.

Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum býráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva at grundstykkini eru smærri, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tví-,ketu- ella raðhúsum.

Ein partur av tí ásettu minstuvíddini kann leggjast burturav sum felags tilhalds og parkeringspláss.

3. Á grundstykkjum smærri enn 400 $m^2$ verður byggiloyvi ikki givið.

Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.

Nettonýtslustigið fyri grundstykkir 400 $m^2$ til víddar verður sett til 0,5 lutfalsliga fallandi við vaksandi grundstykkjavídd til 0,4 fyri grund stykkir 500 $m^2$ og størri.

4. Húsini mugu einans byggjast í einari hædd við nýttari loftshædd og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønu, mált frá miðaljørildi (í miðal við húsahornini). Kjallaragólvið má ikki leggjast hægri, enn lægsta stað á lendi við húsavegg.

Har vegur er nær at húsum, verður gólvhæddin tó at laga seg eftir vegahæddini og verða myndugleikarnir at áseta hæddina á kjallargólvi.

5. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara uppum tey nýtslustig, ið nevnd eru í 3. stk., tá økið verður roknað sum heild.

6. Innan skravera øki (fornur bústaður), er ikki loyvt at byggja ella grava í lendinum uttan at Føroya Fornminnissavn og byggimyndu-leikarnir geva loyvi til tess.

7. Viðvíkjandi gerð og umsiting av tilhaldsplássum og viðvíkjandiøki til parkeringspláss, sí undir ásetingum fyri A-øki.

8. Øll bygging, undantikin tvíhús, raðhús o.t. skal í minsta lagi vera

> 2,5 m frá grannamarki, mált frá ytsta útskoti, t.d. úthangi.
>
> Minsta fráleika frá kommunalum vegi ásetir kommunustýrið, meðan landsvegamynduleikin ásetir fráleikan frá landsvegi.
>
> Bilskúrar, hjallar, skúrar og smá úthús við ongum eldstaði, kunnu verða bygd nærri grannamarki, tó skal grannahoyring fara fram áðrenn loyvi kann gevast.

### Ásetingar fyri Bústaðarøkið B 11

1. Á økinum er loyvt at byggja bústaðir, hús til frítíðar- og ferðavinnuendamál, handlar og størri

vinnuvirkir sum ikki dálka.

2-7. Sum fyri B1 - B10.

## Ásetingar fyri Bústaðarøkið B 12,

Serstøk byggisamtykt.

**Økið byggisamtyktarinnar:**

§ 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri matr. nr. 490d.

**Frágreiðing um økið:**

§2. Bústaðarendamál:

2.1. Útstykkingin framvið Laksá, vestanfyri Kráarvegin er uml. 2.340 $m^2$ til víddar og parkeringspláss eystanfyri Kráarvegin uml. 275 $m^2$ til víddar. Økið liggur í øki B – bústaðarøki.

2.2. Útstykkingin framvið Laksá hevur 10 økir til **smærri smáttur.**

2.3. Atgongd til økið verður frá Kráarvegnum og eru bert gøtur inni á økinum.

2.4. Parkeringspláss til økið verða eystanfyri Kráarvegin.

2.5. Smátturnar standa á felags øki, har ongin girðing er uttanum hvørja smáttu. Byggifeltini verða 5,0 x 8,0 metrar til støddar. Byggifeltini verða staðsett sambært støðumynd nr. 99.01

2.6. Økið, sum smátturnar standa á, verður at leiga frá Vágs kommunu við einum árligum gjaldi, sum verður ásett av Vágs Býráð.

**Nýtsla økisins:**

§3. Økið skal nýtast at byggja smáttur á, sum bert eru roknaðar sum frítíðarbústaður. Økið skal ikki nýtast til heilársbústað og ikki er loyvi at hava adressu á økinum.

**Bygging, stødd, staðseting og snið á smáttunum:**

§ 4. Bygt verður í 10 byggifeltum

4.1. Hvørt byggifelt er til eina smáttu

4.2. Byggjast kann bert í einari hædd

4.3. Mest loyvda hædd er 4,5 m. frá planering av byggifelti

**Útsjónd húsanna:**

§ 5. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

5.1. Allar smátturnar skulu hava sama snið og somu útsjónd.

5.2. Tilfar, sum brúkt verður skal vera sambært ásetingum frá býráðnum.

5.3. Klædningur skal vera úr timbur, svartmálað, vindeygu skulu vera hvít og tekjan skal vera svørt.

5.4. Eingin opin eldstaður er loyvdur í sméttunum.

5.5. Ongar broytingar kunnu gerast uttan við loyvi frá byggivaldinum.

**Byggimyndugleiki og átalurættur:**

§ 6. Byggimynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Vágs Býráði einsamøllum.

**Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar:**

§ 7.

7.1. Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur at teirri orsøk.

7.2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglunum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

## Ásetingar fyri økir til almenn endamál C1 – C10

C1:

1. Økið er avlagt til at byggja barnagarð ella vøggustovu á.

2. Byggistigið má ikki fara uppum 0,4 og nettonýtslustigið má ikki fara uppum 0,4.

C2:

1. Økið er avlagt til at byggja skúlar, kirkju, svimjihøll og kommunuskrivstovu á.

2. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5 og nettunýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.

C3:

1. Økið er avlagt til minnisvarðaøki og skal liggja óbygt.

C4:

1. Økið er avlagt til kirkjugarðar og skal liggja óbygt.

C5:

1. Økið er avlagt til at hýsa vardum verkstaði ella líknandi almennum stovnum.

2. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5 og nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.

C6:

1. Økið er avlagt til at hýsa heilsumiðstøð, samkomuhúsi, peningastovni, handli og tílíkum almennum bygningum.

2. Ein serstøk byggisamtykt er gjørd fyri økið.

C7:

1. Økið er avlagt til ellis og røktarheim, heim fyri sinnisveik, eldrabústaðir. og sosialar bústaðir e.l.

2. Byggistiðið má ikki fara upp um 0,5 og nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,4.

C8:

1. Brand - og bjargingarmiðstøð.

C9:

1. Økið er avlagt til samkomuhús, bústaðir og handlar.

2. Byggistigið má ikki fara uppum 0,5 og nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,6.

C10:

1. Økið er avlagt til at hýsa bátakajum, neystum, kappróðrarbátum, umvælingarplássi til bátar o.t. Mentanarhúsi, verðandi virki og handlum.

2. Ein serstøk byggisamtykt er gjørd fyri økið.

## Ásetingar fyri havna- og vinnuøki D

D1:

1. Økið verður avlagt til havnarendamál og til virkir sum hava við havnina at gera. Nevnast kunnu skrivstovu- og handilsvirkir ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu við tilhoyrandi virksemi. Økið framvið Vágsvegi kunnu tó við loyvið frá býráðnum brúkast til bústaðar endamál.

2. Pláss skal leggjast av til nógmiðið av parkeringsplássum.

3. Hús mugu ikki verða hægri enn 8 m til yvirgrindina og 10 m til mønuna mátað frá miðaljørðildini (miðal við húsahornini).

4. Har havna- og vinnuøkið røkkur heilt niðan til handilsgøtuna, mugu tey ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 7,5 m til mønu, mátað frá gólvhædd. Her verður gólvhæddin tó at laga seg eftir vegahæddini og verða mynduleikarnir at áseta hæddina á gólvi.

Har hæddarmunurin frá gøtuni til havnarøki ger tað møguligt, verður loyvt at hava kjallarahædd (ir), sum skal hava beinleiðis atgongd til havnarøkið.

5. Hús kunnu bert byggjast sambært byggiætlan, sum býráðið og møguligir aðrir mynduleikar hava góðkent, frammanundan.

D2:

1. Byggjast kann eftir tørvi: Timburhandlar, handverksverkstøð, entreprenørvirkir, elementvirkir, smiðjur, goymslur, pakkhús, bilverkstaðir, elverk, bingjuplássa og mangt annað.

2. Hús mugu ikki vera hægri enn 8 m til yvirgrindina og 10m til mønuna, mátað frá miðaljørildini (miðal við húsahornini).

3. Til bygningar, sum lúka tey ásettu krøvini og sum bygdir verða á økinum, skal ávíst øki leggjast av til parkeringspláss. Økið skal í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldinum, soleiðis at farið verður eftir, hvør nýtslan er, tali á starvsfólki og tørvi hjá viðskiftafólki at seta bilin frá sær og tílíkt.

Tó skal í minsta lagi verða ein parkeringspláss fyri hvørjar 50 $m^2$ av brutto hæddar vídd í bygninginum.

4. Hús kunnu bert byggjast sambært byggiætlan, sum býráðið og møguligir aðrir mynduleikar hava góðkent, frammanundan.

D3:

1. Á hesum økinum kann bingjupláss við tí sum hartil hoyrir byggjast. Her kunnu liggja onnur virki sum ikki kunnu liggja samanvið øðrum virkjum vegna gang, lugl o.t.

D4:

1. Bygisamtykt er galdandi fyri økið sunnanfyri Núpin millum Rygsgjógv inn móti Ónavík, ið verður D4 havna- og ídnaðarøkið til virkir, sum hava við aling, fiskaframleiðslu o.a. at gera. Talan er um matr. nr. 623a, 40, 364b, 303a, 601, 303a, 129d, 378a, og 558b Vágur og út á sjógv, sum víst á kortskjalinum.

Ásetingar fyri D4 havna- og ídnaðarøkið í alemmu bygisamtyktini fyri Vágs Kommunu verða:

1. Økið verður avlagt til Havna- og ídnaðarøki og til virkir sum hava við við aling, fiskaframleiðslu og annað har tilhoyrandi virksemi

2. Bygningar mugu ikki vera hægri enn 12m til yvirgrindina og 15m til mønuna, mátað frá miðaljørildini (miðal við húsahornini), og hús kunnu bert byggjast sambært byggiætlan, sum býráðið og møguligir aðrir myndugleikar hava góðkent, frammanundan.

3. Byggjast kann eftir tørvi á økinum: Virkisbygningar, handverksverkstøð, smiðjur, goymslur, pakkhús, elverk, bingjupláss og annað.

4. Til bygningar, sum lúka tey ásettu krøvini og sum bygdir verða á økinum, skal ávíst øki leggjast av til parkeringspláss. Økið skal í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldinum, soleiðis at farið verður eftir, hvør nýtslan er, tali á starvsfólki og tørvi hjá viðskiftafólki at seta bilin frá sær og tílíkt.

## Ásetingar fyri Neystaøkini E

E:

1. Økið verður lagt av til neystabygging.

2. Neyst mugu ikki byggjast í meira enn 2 hæddum og ikki verða hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønu, máta frá miðal jørðildi ( í miðal við húsahornini).

## Ásetingar fyri frílendi F

F:

1. Frílendi tað er lendi, ið liggja avløgd til varveiting av náttúruni, fornminnum og tílíkum og til at fríðka um bygdina og gera hana dámliga at búgva í.

2. Innan hesi øki kann útstykking og bygging ikki fara fram. Tó er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskandi til nútímans nýtslu sum sethús.

3. Somuleiðis er loyvt at gera vegir og gøtur sum neyðugar eru til samanbinding av teimum frammanfyri nevndu økjunum í kommununi.

## Ásetingar fyri ítróttar- og frítíðarøki G

G1:

1. Økið verður lagt av til útiverupláss, spælipláss, ítrótt, frítíðarvirksemi, planting og tílíkt.

2. Innanfyri økið mugu bert verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarðandi økisparti og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tað.

## Ásetingar fyri friðaða øki H

H:

1. Økið H1 verður mett sum landbúnaðarøki, tó við serstakari støðu samsvarandi friðingarlógini.

Økið H2 er friðað sambært lóg um friðing av fornminnum.

Innan økini, har fornir bústaðir eru lýstir at verða, kann eingin bygging ella grevstur fara fram uttan at Føroya Fornminnissavn og byggimynduleikarnir geva loyvi til tess.

## Ásetingar fyri øki til frítíðarhús I

I:

1. Økið er avlagt til summar- og frítíðarhús.

2. Byggistigið má ikki fara uppum 0,5 og nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,6.

## Ásetingar fyri landbúnaðarøki

1. Á landbúnaðarøkinum er bert loyvt at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja rakstur av virkjum við teimum endamálum, sum nevnd eru í pkt. 3.9.

Byggivaldið kann tó geva loyvi til at byggja slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til el-veitingar, vatnveitingar til kloakkering og til telesamband.

2. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst møguligt.

## Byggilinjur

Framvið el-høvuðsveiting eru 6 m byggilinjur.

### Veitingar

Vágsvatn hevur eitt avfalsøki sum er 0,77 $km^2$ til víddar. Umleið 2/3 av hesum øki er í Porkeris Kommunu og umleið 1/3 í Vágs Kommunu.

Á avfalsøkinum sum er í Vágs Kommunu, er ikki loyvt at byggja hús, fjós ella teknisk virki, sum við sínum virksemi ber vanda við sær fyri eitran av vatninum á økinum.

Øll verandi bygging skal kloakkerast soleiðis, at krøvini í heilsusamtyktini verða uppfylt.

Framtíðar vatnveitingar- og kloakkarbeiðir skulu gerðast sambært útstykkingar ætlanum.

## 4.12. Broytingar

Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir býráðssamtykt og við góðkenning av landsstýrinum eftir reglunum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

## 4.13. Serstakar byggisamtyktir

Býráðið kann tryggja serligar ásetingar í einum økisparti við at gera eina serstaka byggisamtykt. Ein serstøk byggisamtykt umfatar meira nágreiniligar ásetingar til dømis útstykkingarætlan, tilfar, litir, umsiting, stødd og staðseting.

Kunngerð, góðkenning og broytingar skulu gerðast eftir somu reglum sum eru galdandi tá byggisamtyktir verða gjørdar.

# 5. SERSTAKAR BYGGISAMTYKTIR

## 5.1 Serstøk byggisamtykt fyri Løðhamar C2

Mál: 17/00013-4

Økið C2 -Økið á Løghamri er sett av til miðstiðarøkið.

## 5.2 Serstøk byggisamtykt fyri á Gørðunum

Mál: 17/00008-2

Økið C10 á Gørðunum er gjørd serstøk byggisamtykt, ið er galdandi sunnanfyri høvðusgøtuna og er vestanfyri avmarkað av sandinum og Nýlendinum eystanfyri í Vági. Mál:

### GR. 1 Øki byggisamtyktarinnar

- Økið er avmarkað sum sýnt á tekning "Kort av serstøku byggisamtykt nr. 1" og røkkur um nevndu matr.nr: 613m, 613n, 613c, 613ap, 613p, 613o, 613ag, 613a, 639, 387, 370, 19, 613i, 398, 397b, 396a, 396b, 395c, 394, 393, 613f, 613s, 613ao, 613r, 613ah, 613ai, 613ak, 623a og Litra ø.

### GR.2 Nýtsla Økisins

- Økið er sundurbýtt í eindirnar: A, B og C

### Eind A.

- Eindin verður til miðstaðaendamál, sum heilt ella lutvíst verða innrættað til handlar, matstovur, skrivstovur, stovnar, mentunnarhøli, heilsubótarhøli og tílíkt.
  Atlit skal, undir broytingum av verandi fiskahúsum og krambúðini v.m., verða tikin til tann byggihátt, sum er á staðnum.
  Nýbygging á eindini verður sum leiðbeinandi sýnt á tekning "Uppskot til bygging Á Gørðunum".
  Verandi sethús í eindini kunnu framyvir verða sum higartil og skulu broytingar gerast á húsini, skal hetta gerast í samráð við byggieftirlitið.
  Verða sethús niðurtikin, skulu hesi, um bygt verður av nýggjum, verða til miðstaðabygging.

### Eind B.

- Eindin verður til neystabygging og miðstaðabygging, sum heilt ella lutvíst verða innrættað til virksemi í sambandi við bátabrúgvarnar, matstovur, handlar, goymslur, skrivstovur, stovnar, mentunnarhøli, heilsubótarhøli og tílíkt.
  Eisini er á eindini loyvt at gerða búðstaðir á 2. hæddini í byggingini framvið bátabrúgvunum.
  Verandi virkir skulu kunna víðkast, tá ið hetta er í trá við hesa byggisamtykt.
  Nýbygging á eindini verður sum synt á tekning " Uppskot til bygging við bátabrúgvar".
  Móti sjónum, millum Sandin og verandi Garðabrúgv, verða gjørdar nýggjar bátabrúgvar úr timbri, við drátti til neystini og bátaplássi vestast á eindini.
  Neyst, bátabrúgvar og bátapláss skulu saman kunna nýtast í sambandi við regatta og annað bátavirksemi.

## Eind C.

- Eindin verður til neystabygging og virksemi í hesum sambandi.

## GR. 3 VEGIR, PARKERING OG TÚN.

- Lendi avlagt til vegir, parkering og tún verður sum sýnt á tekning "Uppskot til skipan av økinum Á Gørðunum.
  Roknað er við at tann dagliga parkeringin fer fram í teimum á tekningini vístu uppmerktu básunum. Tó skal bera til, tá ið serlig
  tiltøk eru t.d. í Stóra Pakkhúsi, at seta bilar á tað steinsetta og flísalagda øki.
  Hjá teimum, sum hava virksemi í økinum, skal verða møguleiki fyri av- og áskipan.

## GR. 4 ALMENT.

- Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
- Dámurin í økinum skal varðveitast mest møguligt, hvat viðvíkjir verandi bygningum, serligan týdning hevur hetta fyri verandi bygningarnar í eindunum A og C., eisini verður víst til viiheftu tekningar.

## HVUSSU BYGGISAMTYKTIN SKAL HALDAST

- Áðrenn farið verður undir at byggja ella broyta fyrrverandi nýtslu av eini ogn, skulu fyri býráðið verða lagdar tekningar, ið sýna grundirnar og umhvørvi hennara, og hvussu húsini standa á grundini, stødd teirra, snið og innrætting, eins og upplýsingar skulu verða givnar um, hvat húsini og grundin ætlast nýtt til, so býráðið kann ansa eftir, at gjørt verður eftir byggisamtyktini.

## VERANDI BYGGING

- Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi løglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við løgligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglum í byggisamtyktini.

## BYGGIMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

- Byggimynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Vágs býráð einsamøllum.

## BROT MÓTI BYGGISAMTYKTINI

- Revsing fyri brot móti hesi byggisamtykt, rættargangur í máli um tílík brot, broyting av óløgligum standi og hjálp frá løgregluni við hesum, verður sum fastsett í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, 22gr.

## UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

- Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur býlingsins, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, verður ikki broyttur av teirri orsøk.
- Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

## BYGGIUMSÓKNIR

- 1. Bygging, umfatað av ásetingum í byggisamtyktum sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, má ikki fara fram uttan skriftligt loyvi frá byggifultrúanum er fingið til vegar.
- 2. Allar umsóknir, har uppí í umsóknir um loyvi til at grava fyri grund og møguligar spreingingar, til broytingar innan ella uttan sum til dømis at bróta ígjøgnum múrar (veggir) og skilarúm, seta upp eldstaðir, taka niður niður ella flyta hús ella partar av húsi, vega-, kloakk- og frárenningsarbeiði, skulu vera sendar byggifulltrúanum.
- 3. Loyvi til smærri byggiarbeiði kunnu verða givin av starvsfólki, sum byggivaldið hevur givið fulltrúð til tess.

- 4. Tekningar og útrokningar skulu verða gjørdar av fólki, sum hava førleika til tess – av arkitektum, verkfrøðingum, teknikarum ella øðrum, sum byggivaldið heldur hava nóg góðan kunnleika til tess, og um tekningar og útrokningar teirra lúka tey krøv, ið vanliga verða sett til projektering.

- 5. Allar tekningar, planir, frágreiðingar, útrokningar o.t. fylgiskjøl hjá byggiumsókn, skulu verða dagfest, hava matr. nr. á ognini, og hann ið uppsett tey hevur, skal skriva undir niðast á umsóknini. Hesin hevur ábyrgd av, at tey eru fullgóð.

- 6. Sum fylgiskjøl við umsóknini um húsabygging skulu verða hjáløgd:
    - a. Støðuplanur, í minsta lagið 1 : 1000, sum vísir støðd og skapilsi á byggigrundini, hvussu hon vendir móti gøtum og ættum, hvar og hvussu ætlað hús skulu standa, og ætlaðan kloakkplan og aðrar vatnburturveitingar.
    - b. Flatmyndir av húsunum í minsta lagi mát 1:100 við ásrivaðum mátum. Skilast skal til, hvat rúmini eru ætlað til. Berandi konstruktiónir skulu verða teknaðar og sperrurnar vístar, eisini skulu dyr, saniterar innleggingar o.a. verða á tekningunum.
    - c. Tvørskurður í minsta lagi 1:50, sum neyðugir eru fyri at fáa eina fatan av húsunum, og hvussu tey konstruktivt eru bygd.
    - d. Frágreiðingar, sum saman við tekningum gevur fullgóða og greiða lýsing av ætlaðu byggingini.

## 5.3 Serstøk byggisamtykt fyri smáttur við Laksá B12

Mál: 14/00078

§ 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað sum sýnt á kortskjølum, kort "broyting 4" til matr. nr. 490d, 490e, 490g og 490l og ein part av matr. nr. 490a.

### Frágreiðing um økið:

§2. Bústaðarendamál:

2.1 Útstykkingin framvið Laksá, vestanfyri Kráarvegin er uml. 2340 ferðmetur til víddar og parkeringspláss eystanfyri Kráarvegin uml. 275 ferðmetrar til víddar. Økið kemur at liggja í øki B – bústaðarøki.
2.2 Útstykkingin framvið Laksá hevur 10 økir til smærri smáttur.
2.3 Atgongd til økið verður frá Kráarvegnum og eru bert gøtur inni á økinum.
2.4 Parkeringspláss til økið verða eystanfyri Kráarvegin.
2.5 Smátturnar standa á felags øki, har ongin gyrðing er uttanum hvørja smáttu. Byggifeltini verða 5,0 x 8, metrar til støddar. Byggifeltini verða staðsett sambært støðumynd nr. 99.01
2.6 Økið, sum smátturnar standa á, verður at leiga frá Vágs kommunu við einum árligum gjaldi, sum verður ásett av Vágs býráð.

### Nýtsla økisins:

§3. Økið skal nýtast at byggja smáttur á, sum bert eru roknaðar sum frítíðarbústaður. Økið skal ikki nýtast til heilársbúðstað og ikki er loyvi at hava adressu á økinum.

### Bygging, støðd, staðseting og snið á smáttunum:

§ 4. Tað kann bert byggjast innanfyri byggifeltini, ið eru ávíst á støðumynd nr. 99.01 harumframt skulu vera minst 5 metur millum smátturnar.
4. 1 Hvørt byggifelt er til eina smáttu
4.2 Byggjast kann bert í einari hædd
4.3 Mest loyvda hædd er 4,5 m. frá planering av byggifelti

4.4 Úthang skal vera 30 cm

## Útsjónd húsanna:

§ 5. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerðast í samráð við byggivaldið.

5.1 Allar smátturnar skulu hava sama snið og somu útsjónd.

5.2 Tilfar, sum brúkt verður skal vera sambært ásetingum frá býráðnum.

5.3 Klædningur skal vera úr timbur, svartmálað, vindeygu skulu vera hvít og tekjan skal vera grøn.

5.4 Eingin opin eldstaður er loyvdur í smáttunum.

5.5 Ongar broytingar kunnu gerðast uttan við loyvi frá byggivaldinum.

## Byggimynduleiki og átalurættur:

§ 6. Byggimynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Vágs býráði einsamøllum.

## Undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar:

§ 7.

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur at teirri orsøk.

# 6. TRYGGING OG ÚTINNING

## 6.1. Samtykt:

Býarskipanin og byggisamtyktin skulu samtykkjast av býráðnum og góðkennast av landsstýrinum.

## 6.2. Avleiðingar fyri býráð og ognarmenn:

1. Býarskipanin hevur ikki í sær sjálvari bindandi rættargildi mótvegis tí einstaka grundeigaranum ella borgaranum.

2. Harafturímóti gevur byggisamtyktin kommununi rætt til at ognartaka jørð, sum tað eftir skipanini fer at hava alstóran týdning fyri kommununa at ráða yvir.

3. Tað er skylda kommununar, við fyrisiting sínari, at fylgja einari góðkendari býarskipan og kann tessvegna ikki góðkenna umsóknir um nýbygging og nýgerð, sum koma í stríð við hesa.

4. Býarskipanin ella byggisamtyktin kann ikki áleggja einum ognarmanni at broyta nýtsluna av ogn síni, sjálvt um hon er á øki, sum skipanin sigur skal nýtast á annan hátt.

5. Einki er til hindurs fyri, at t.d. á bústaðarøkjum kunnu stovnast smáir handlar til at veita fólki á staðnum dagligar nýtsluvørur, ella smá virki, sum ikki eru til bága fyri tey sum búgva uttanum.

6. Tá ið ávísar fyritreytir eru, sum greindar eru í lógini, kann ognarmaður, móti endurgjaldi krevja, at tað almenna yvirtekur ogn hansara alla ella ein part av henni.

## 6.3. Kunngerð:

1. Áðrenn uppskot til byggisamtykt verður sent landsstýrinum, skal tað leggjast fram til almenna eftirskoðan á stað, sum er høgligt hjá íbúgvunum at koma til, í minst 3 vikur eftir at hetta hevur verið almanna kunngjørt.

2. Møgulig mótmæli og broytingaruppskot til byggisamtykt, ið skulu vera skrivlig, skulu vera býráðnum í hendi, áðrenn 6 vikur eru gingnir frá kunngerðardegnum.

Mótmæli og broytingaruppskot, sum býráðið ikki samtykkir í, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

## 6.4. Endurskoðan:

1. Skipanin er framhaldandi arbeiðslag. Til tess at gera býarskipanina til eitt veruligt arbeiðsamboð fyri býráðið er neyðugt við jøvnum millumbilum t.d. einaferð í hvørjum valskeiði, at taka hana upp til metingar og møguliga endurbøtingar.

2. Millum annað kunnu fyritreytirnar fyri víddirnar av teimum avløgdu økjunum broytast eftir fáum árum.

3. Broyting av býarskipan og byggisamtykt verður gjørd eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri gerð av nýggjum býarskipanum/ byggisamtyktum.

## 6.5. Góðkenning:

Soleiðis viðtikið av Vágs Kommunu.

Vágur, tann 12 /02 - 2019

______________________________ ___________________________________

Dennis holm, borgarstjóri Petry Joensen, kommunuskrivari

Sambært gr. 4, stk. 1 í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verða frammanfyri standandi uppskot til býarskipan og byggisamtykt fyri Vágs Kommunu góðkend.

# 7 FYLGISKJØL

- Kort útskriva 01-02-2019, av MUNIN
    - Býarskipan Vágur, sum samtykt av kommunustýrinum 12. oktober 2018
- Flatmynd av økinum á Oyrinum
- Yvirlitskort yvir smátturnar við Laksá

# 8 Kortskjal

## 8.1 yvirlitskort Býarskipan Vágur, sum samtykt av kommunustýrinum 12. oktober 2018



## 8.2 Yvirlitskort yvir økið inni í Ónavík



## 8.3 Yvirlitskort yvir økið smáttunar við Laksá



## 8.2 Yvirlitskort av økinum á Oyrinum



## 8.3 Yvirlitskort yvir økið á Løhamar

